# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



Myndir: Magnus Gunnarsson

# Scandinavian Custom Show 2010



Um vikuskiftið var framsýningin Scandinavian Custom Show 2010 í Bella Centrinum í Keypmannahavn.

Talan er um eina framsýning við teimum flottast umbygdu bilunum og motorsúkklunum í Norðurlondum. Akførini komu úr Danmark, Svøríki, Norra og Finnlandi. Yvir 500 megaflott akfør vórðu sýnd fram á einum øki upp á 20.000 fermetrar í Bella Centrinum.

Scandinavian Custom Show er ein rættuliga sermerkt framsýning. Flott design, flottar lakkeringar og motivlakkering, og megafeit ljóðanlegg sum settu sín serliga dám á framsýningina.



*Tempo Gigante er bilurin í norska barnafilminum filminum Pinchcliffe Grand Prix frá 1975 sum mong kenna. Bilurin hevur luttikið á nógvum framsýningum kring um í heiminum*



*Hesin umbygdi Ford Mondeo úr Finnlandi er eitt megastórt ljóðanlegg við 80 hálarum umframt forsterkarar og aðra útgerð*







*Nógvar motorsúkklur vóru á framsýningini*

## Hósdagin 18. november kl. 17

Í sendingini Vinnu- & Bilradio verður vitjað á Scandinavian Custom Show 2010 í Bella Centrinum í Keypmannahavn. Samrøður eru við t.d. Johnny Wagner, formann í Swift Club Denmark, Remo Caprino frá Caprino Studios, um sergjørda bilin Tempo Gigante og við Mikael Morell frá Streetfire.dk, sum skipaðu fyri framsýningini.

Samrøða eisini við Naddodd Jacobsen, sum arbeiddi sum bilmekanikari, til hann var farin um tey 70 árini.



Naddoddur Jacobsen



Mikael Morell



Remo Caprino

Vinnu- & bílradio á Rás 2